# Ótrygg kirkju-yvirtøka

**Fólkakirkjan verður yvirtikin í skundi, uttan at fólkið hevur fingið tíð at siga sína hugsan um yvirtøkuna, heldur Hendrik Old, sum vil hava løgmann at tryggja, at kirkjan ikki verður yvirtikin, fyrrenn alt er púra klárt**

YVIRTØKA
*Magnus Dam*

Gongst sum landsstýrið ætlar, kemur fólkakirkjan á føroyskar hendur 1. januar næsta ár. Álit er skrivað um yvirtøkuna, og samband er millum landsstýrið og stjórnina um yvirtøkuna.

Samráðingarnar skulu ganga skjótt, tí bert tveir mánaðir eru eftir av árinum, og tað eru tey, sum halda, at ov lítil tíð er sett av til fyrireikingarnar. Hendrik Old úr Javnaðarflokkinum heldur tað vera veruleikafjart, at yvirtøkan kann fara fram longu um tveir mánaðir, og hann vil hava løgmann at tryggja, at yvirtøkan ikki verður skunda ígjøgnum.

Hann vil hava løgmann at tryggja, at ongar broytingar verða gjørdar, fyrrenn tað er púra greitt, hvussu kirkjan skal skipast í framtíðini. Og somuleiðis eigur løgmaður at tryggja, at løgtingið og Føroya fólk fáa høvi til at siga sína hugsan um kirkjuna, áðrenn hon verður yvirtikin.

Hann heldur, at ætlanirnar hava skapt stóran ótryggleika í fólkinum og ikki minst hjá teimum, sum starvast hjá fólkakirkjuni. Hann heldur eisini, at løgtingið ikki hevur fingið høvi til at viðgera ætlanirnar, og at yvirtøkan tí átti at verið útsett.

- Fólkakirkjan eigur ikki at misnýtast sum politisk kastibløka upp undir eitt valstríð. Ikki var órímiligt um eitt fýra ára valskeið varð nýtt til hetta, sigur Hendrik Old í viðmerkingunum til fyrispurningin til løgmann.

# Miltbrandur í Hvítu Húsunum

**Samstundis hava amerikansku myndugleikarnir gjørt av at kanna 10.000 starvsfólk í postverkinum**

Amerikansku heilsumyndugleikarnir váttaðu í gjár, at teir hava funnið miltbrandbakteriur í postskiljingini í Hvítu Húsunum í Washington. Sjálv postskiljingin er á einum posthúsi, sum er nakrar kilometrar frá forsetahúsunum, og tað posthúsið er nú stongt.

Myndugleikarnir hava longu tikið fleiri royndir í Hvítu Húsunum, men higartil hava teir ikki staðfest miltbrand har, segði talsmaðurin hjá George W. Bush, forseta, Ari Fleischer, í gjár.

Kortini hava myndugleikarnir gjørt av at kanna øll tey, sum starvast í Hvítu Húsunum og tey, sum starvast á posthúsinum, har posturin verður skildur. Allur postur til forsetan og skrivstovurnar hjá forsetaumsitingini, verður eisini kannaður. Endamálið við hesum er eisini at fáa staðfest, hvaðani møgulig smittuberandi brøv koma.

## Gera mun á

Starvsfólkið í amerikanska postverkinum hevur kravt, at myndugleikarnir skulu betra trygdina, og í gjár samtykti leiðslan at kanna næstan 10.000 starvsfólk, sum arbeiða á posthúsum í Washington og har um vegir.

Men postfólkini eru ikki nøgd. Tey halda, at myndugleikarnir leggja alt ov lítið í trygdina á posthúsunum, meðan umfatandi tiltøk verða sett í verk, hvørja ferð ein politikari fær eitt bræv, ið kann tykjast illgrunasamt. Víst verður m. a. á, at Kongressin bleiv stongd í fleiri dagar, tá tað frættist, at senatorurin Tom Daschle hevði fingið eitt bræv við miltbrandbakterium.

Heilsumálaráðharrin, Tommy Thompson, hevur lovað postfólkunum betri trygd í framtíðini.

# Løgmaður drigin upp í Trøllanesmálið



*Børnini á Trøllanesi sleppa framvegis ikki í skúla í heimbygdini, tí avgerðin hjá Mikladals bygdaráði stendur við. Hetta hóast avgerðin, sambært Vilhelm Johannesen, tingmanni, stríðir móti fleiri lógum*

**Vilhelm Johannesen heldur, at løgmaður má koma uppí Trøllanesmálið og ógilda avgerðina hjá Mikladals bygdaráði um at niðurleggja skúlan á Trøllanesi. Avgerðin stríðir móti fleiri lógum, heldur tingmaðurin.**

SKÚLASTRÍÐ
*Magnus Dam*

Drúgva ósemjan um skúlan á Trøllanesi er nú reist sum fyrispurningur í løgtinginum. Tað er Vilhelm Johannesen úr Javnaðarflokkinum, sum hevur sett Anfinni Kallsberg, løgmanni, sum varir av kommunumálum, fleiri spurningar um ósemjuna.

Vilhelm Johannesen sjálvur er ikki í iva um, at avgerðin, sum bygdaráðið tók á sínum fyrsta fundi eftir bygdaráðsvalið, er ólóglig. Hann skilur ikki, hvussu Kommunala Eftirlitið í Tinganesi kann koma til eina aðra niðurstøðu, tí avgerðin stríðir móti fleiri ymiskum lógum, heldur tingmaðurin.

Avgerðin um ikki at taka skúlagongdina upp aftur eftir summarfrítíðina í ár, varð tikin á fundi 9. januar. Talan var um fyrsta fundin hjá nývalda bygdaráðnum, men trupulleikin er, at fundurin ikki varð lýstur alment, eins og kommunustýrislógin ásetur. Men hóast hetta er fundurin ikki ólógligur og avgerðirnar ikki ógildugar, staðfestir Kommunala Eftirlitið. Orsøkin er, at nývaldu bygdaráðslimirnir ikki vóru greiðir yvir reglurnar í kommustýrislógini, sigur eftirlitið. Við øðrum orðum, so er fundurin lógligur og avgerðirnar gildugar, tí bygdaráðslimirnir vóru óvitandi um reglurnar í lógini, sum siga, at allir fundir skulu almannakunngerast.

## Einastandandi avgerð

Vilhelm Johannesen heldur, at avgerðin hjá eftirlitinum er einastandandi. Hvar gongur markið fyri, nær eitt kommunustýri er so mikið gamalt, at kravt kann verða, at limirnir eru kunnugir við reglurnar í komunustýrislógini, spyr Villhelm Johannesen. Hann heldur tað vera vandamikið, at lógin verður skúgvað til viks í hesum førinum.

- Hetta ber í sær, at nývald bygdaráð á sínum fyrsta fundi kunnu taka allar hugsandi avgerðir uttan at fylgja demokratisku mannagongdini, sum liggur í kommunustýrislógini, vísir hann á.

Men kommunustýrislógin er ikki einasta lógin, sum ikki er fylgd í hesum málinum, heldur tingmaðurin. Ásetingar í fólkaskúlalógini eru heldur ikki fylgdar. Í fólkaskúlalógini stendur, at avgerðir hjá einum kommunustýri um at niðurleggja ein skúla skulu kunngerast í bløðunum. Men hetta er ikki nóg mikið. Lógin gevur eisini íbúgvunum rætt til at krevja eina fólkaatkvøðu um avgerðina. Seta 30 prosent av íbúgvunum í skúlaumdøminum fram ynski um eina fólkaatkvøðu, so skal ynskið eftirlíkast. Men hendan møguleika fingu íbúgvarnir ongantíð, tí avgerðin um at niðurleggja skúlan varð ikki almannakunngjørd, fyrrenn alt ov seint var til at seta fram eitt tílíkt ynski.

## Avgerðin má strikast

Vilhelm Johannesen staðfestir í fyrispurninginum, at hvørki mannagongdirnar í kommunustýrislógini ella fólkaskúlalógini eru fylgdar.

- Løgmaður má tí haldast at hava skyldu at ógilda eina slíka avgerð, ið er grundað á eina ólógliga og ódemokratiska mannagongd, sigur Vilhelm Johannesen, sum vil hava løgmann at greiða frá, hvussu tað ber til, at avgerðirnar hjá bygdaráðnum verða standandi, hóast brot á fleiri lógir.

- Løgmaður tykist bert at síggja millum fingrarnar við hesum. Ella tað, sum verri er, hann tykist at halda hondina yvir hesar mannagongdir, sum heilt greitt fremja bort á áðurnevndu lógir, sigur Vilhelm Johannesen.

Í viðmerkingunum undrast tingmaðurin eisini á, hvussu hetta samsvarar við alt tosið um bygda- og útoyggjamenning og almenna politikkin hjá øllum flokkum um, at barnaskúli skal vera í øllum bygdum, har skúlabørn eru.



# Smyril fær ikki frið

**Herverk verður ofta framt umborð á Smyrli. Serliga eru tað flúgvarasetrini, sum standa fyri skotum. Nú fer Strandferðslan at gera enn eina roynd at bøta um óskilið**

HERVERK
*Edvard Joensen*



*Flúgvarasetrini umborð á Smyrli verða fyribeind av herverki. Tað er harmiligt, sigur tekniski stjórin á Strandfaraskipum Landsins, men Strandferðslan fer aftur at gera eina roynd at bøta um óskilið*
*Mynd: Edvard Joensen*

Flúgvarasetrini umborð á Smyrli síggja ræðulig út. Tey eru sorað sundur av ótangum, sum ikki klára at halda fingrarnar hjá sær sjálvum.

Uppskorin setur. Rygglen, sum eru skrædd av. Og onkunstaðni manglar alt setrið, sum tað er. Soleiðis er støðan afturi í gongini, har fúgvarasetrini á Smyrli eru. Ein syndarlig sjón, sum er íkomin av reinum og skærum herverki, sigur ein av manningin á Smyrli, sum er ógvuliga harmur um støðuna.

Magnus Magnussen, tekniskur stjóri á Strandfaraskipum Landsins, sigur, at hetta er í grundini ikki nakað, sum nýliga er íkomið. Hetta er ein afturvendandi trupulleiki, sum Strandferðslan við tíðini hevur brúkt nógvar pengar uppá. Og tað er harmiligt, at teir skulu fara soleiðis fyri einki av berum ólíkindum.



## Royna aftur

Men Strandfaraskip Landsins fara enn einaferð at gera eina roynd at fríðka Smyril soleiðis, at øll tey mongu ferðafólkini, sum uppføra seg sum vanlig fólk plaga at gera, skulu hava eitt hampiligt stað at sita í. Tí júst hesi setrini verða rættiliga nógv brúkt, sigur Magnus Magnussen.

Tey liggja soleiðis fyri, at har er frísk luft og lætt at koma til og frá, um ein til dømis hevur sjóverk. Stutt er aftur á afturdekkið, har slíkt kann avgreiðast.

Men so eru tað tey, sum ikki duga at síggja nakað hampiligt uttan at taka eina hond í fyri at oyðileggja tað. Grundirnar kunnu vera ymiskar, og ein kann vera, at tað bara stutt og greitt er ov freistandi, tá ein situr soleiðis og gløðir inn í eitt stólabak, at knívurin verður settur í, sigur tekniski stjórin á Strandferðsluni.

Tey fara nú at royna at bøta um hetta við at venda øðrumhvørjum raði, soleiðis at tey venda í móti hvørjum øðrum og altíð standa við bakinum til tað næsta raðið. Soeliðis sum fremra salongin er innrættað, og ein sær í bussum og tokum.

Magnus Magnussen sigur, at hesin sami trupuleikin eisini var uppi á sóldekkinum, har beinkirnir heldur ikki fingu frið. Men eftir at teir vórðu vendir fyri nakað síðan, hevur borið betri til. Hetta verður nú gjørt við flúgvarasetrini eisini.

Annars sigur hann, at Strandferðslan arbeiðir við at fríðka um flotan sum so.

– Tað skal verða ein sjónlig renovering, sum tekniski stjórin tekur til. Slíkt, sum ferðafólkini síggja, skal skiftast út. Eitt nú setur og dúrkálegging. Málast skal og so framvegis. Talan verður í fyrsta umfari um Smyril, Dúgvuna, Ternuna og Rituna , sigur hann.

## Ellið tekur at boyggja

Smyril er við at røkka tí aldri, at tað kann sigast um hann, at »Grána tekur høvur títt, ellið tekur at boyggja«.

Tvær ferðir seinastu tvær vikurnar hevur hann verið í dokk, tí manningin er vorðin varug við, at hol hevur verið á skrokkinum.

Magnus Magnussen sigur, at talan var í báðum førunum um tvey evarska smá hol, sum stavaðu frá eini sera konsentreraðari tering í skrokkinum. Holini vóru á einum lítlum øki á síðuni.

Tá fyrra holið varð gjørt aftur, var tað so óheppið, sigur hann, at pútan, sum helt skipinum inni í dokkini, stóð júst á tí staðnum, har hitt seinna holið varð funnið fjúrtan dagar seinni. Men nú eru so bæði holini tett aftur, sigur Magnus Magnussen.

Ein lítil stálpláta er sveisað uttan á skrokkin, har holini vóru, soleiðis at nú er tætt.

Hetta er ikki nøkur endalig loysn, men verður verandi, til skipið skal aftur til regluligt eftirlit komandi ár. Tá verður tærda pettið skorið burtur, og nýtt set íaftur.

Magnus Magnussen sigur, at ongum nýtist at óttast fyri, at hendan lappingin er nøkur »lappaloysn«, tí hon er góðkend av klassanum, sum var á Skála, tá bøtt vað, so trygdin er í lagi, leggur hann dent á.